# Bjarga ikki sløsi hjá landsstýrinum

**– Vit taka fult undir við, at strandfaraskipini verða undantikin einum verkfalli, men hetta er nakað, landsstýrið skal samráða seg fram til í »friðartíð«. Vit fara ikki at skerja rættin hjá fakfeløgunum upp undir eitt verkfall, sigur Høgni Hoydal**

Leo Poulsen

Lokalfeløgini hjá Tjóðveldi gera vart við seg, nú tað er vandi fyri, at eitt verkfall á almenna arbeiðsmarknaðinum fer at skerja samferðsluna millum útjaðaran og meginøkið.

Bæði lokalfelagið í Suðuroy og í Sandoynni hava sent áheitanir um at lata strandferðsluna verða undantikna, um verkfall verður. Suðuroyar Tjóðveldisfelag heitir beinleiðis á tingmanning floksins um at syrgja fyri, at Smyril ikki verður lagdur, um verkfall verður.

Sandoyar Tjóðveldisfelag vendir sínari áheitan meiri til fakfeløgini um at lata strandfaraskipini sigla undir einum møguligum verkfalli.



*Tjóðveldi fer ikki at forða fyri, at Smyril verður lagdur, verður verkfall á almenna arbeiðsmarknaðinum*

Men formaður Tjóðveldis er púra avgjørdur, kemur eitt uppskot um at lata strandfaraskipini verða undantikin einum møguligum verkfalli.

– Vit fara ikki at blanda okkum politiskt upp í eitt verkfall. Vit skilja sjálvandi støðuna í útjaðaranum, sum verður dupult raktur, men tá tað verður heitt á Tjóðveldi um at syrgja fyri, at strandfaraskipini sigla undir einum verkfalli, so er adressan púra skeiv, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur, at um landsstýrið hevði havt ynskir um at undantaka strandfaraskipini einum verkfalli, so skuldu teir havt syrgt fyri hesum umvegis samráðingar í »friðartíð«.

### Einki trýst

Formaðurin í Tjóðveldi heldur, at tað er at gera seg beinleiðis inn á samráðingarrættin hjá fakfeløgunum, um politiski myndugleikin við lóg áleggur manningini á strandfaraskipunum at sigla, hóast fakfelag teirra er í verkfalli.

– Vit syrgdu í sínari tíð fyri, at skipini hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni blivu undantikin verkfalli, og tað var gjørt við samráðingum. Johan Dahl hevur sitið í trý ár við ábyrgd fyri Strandferðsluni uttan at rørt ein fingur, og at koma nú, klokkan fimm minuttir í tólv, at kroysta eina avgerð niður yvir fakfeløgini – tað verða vit ikki við til, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur tó, at flokkurin tekur fult undir við at fáa greiði á hesum málinum, tí hann dugir væl at síggja, at tað er órímiligt, at útjaðarin verður dupult raktur av einum verkfalli, men hetta skal sum sagt gerast við samráðingum og ikki við lógarásetan.

– Tað rínir ikki við, um áheitanir koma úr einum øki ella øðrum. Vit fara ikki at taka undir við lógarásettum undantaki frá einum verkfalli. Vit skilja væl, at tað rakar dupult, og at tað kann tykjast órættvíst, men hetta er nakað, sum skal greiðast millum sáttmálasamráðingar, sigur Høgni Hoydal.

Tað stendur sostatt greitt, at hvørki tjóðveldisfelagið í Suðuroy ella í Sandoy skulu vænta hjálp frá flokkinum í einum møguligum verkfalli.

*leo@sosialurin.fo*

# Spara 20 mió fyri hvørt prosent

**Skal landið halda fast um lønarkarmin, er bert neyðugt við hálvari viku í verkfalli fyri hvørt prosent, sum lønirnar hækka, vísa útrokningar**

Leo Poulsen

Lønarkamurin skal haldast, eru boðini frá fíggjarmálaráðharranum.

Tað hevur verið tulkað soleiðis – og tað vísa ábendingar eisini – at hækka lønirnar, merkir hetta uppsagnir innan tað almenna.

Fyri landið kann tað fyri so vítt verða líkamikið, um lønirnar verða útgoldnar til 9.000 fólk ella til 8.900. Bara samlaðu lønarútreiðslurnar ikki hækka.

Verða fólk søgd úr starvi fer tað tó undir øllum umstøðum at merkjast onkunstaðni, tí tá verða fleiri noydd undir ALS, og tað ávirkar ikki beinleiðis almenu lønarútgjaldingarnar.

Ein annar háttur hjá tí almenna at halda lønarkarmin er, at lata fakfeløgini fara í verkfall, tí tá sparir tað almenna nógvar pengar. Upplýst er, at hvørt prosent, ið lønirnar hækka, merkir eina eyka lønarútreiðslu til landið á 20 milliónir krónur.

Við eitt sindur av høvuðrokning finst fram til, at samlaðu lønarútreiðslurnar til almennu starvsfólkini tá eru tvær milliardir. 20 milliónir býtt yvir 52 vikur gevur runt roknað tvey prosent um vikuna.

Verður gingið út frá, at fakfeløgini fáa 3% lønarhækking, skal tað almenna bara lata fakfeløgini verða í verkfalli í hálva aðru viku, so passa pengarnir. Fakfeløgini rinda so løn til sínar limir í hálva aðru viku, og tað almenna megnar at halda samlaða lønarkarmin.

Sjávlandi er roknistykkið ikki heilt so einfalt, men teoretiskt er tað rætt. So er spurningurin bara, um útjaðarin er einasti parturin av Føroyum, ið skal líða fyri loysnini.

*leo@sosialurin.fo*



***Fíggjarmálaráðið kann bara lata fakfeløgini fara í verkfall, so sparir tað almenna tvey prosent fyri hvørka viku, verkfallið varir***